## Ein partur av søguni

- Eg haldi, at eg sá dystin beinleiðis í sjónvarpi, men eg veit tað ikki við vissu. Men sjálvandi vita øll, hvat sipað verður til, tá sagt verður Landskrona og 1990. Men eg veit ikki, um vit fáa brúkt tað til nakað serligt í dag. Persónliga vildi eg heldur havt Ongland ella okkurt av tí slagnum í okkara potti. Fyri mítt viðkomandi er 1990 bara ein partur av føroyskari fótbóltssøga, hóast tað sjálvandi var eitt fantastiskt úrslit, sigur Arnbjørn T. Hansen.



## Sæst á netinum

Tað er blivið alt meiri vanligt, at ein kann streama fótbóltsdystir á internetinum. Serliga hjá fólki, sum eru langt av landi skotin er hetta ein gyltur møguleiki. Og føroyingar úti í heimi verða ikki snýttir fyri upplivingina, sum bíðar heimafólkinum komandi leygardag klokkan 16, tá Føroyar og Eysturríki bresta saman á Tòrsvølli í HM-undankappingar-dysti. Dysturin hevur orsaka av serligu søguni eisini stóran áhuga kring Heimin. FIFA boðar á síni heimasíðu frá, at tað ber til at streama dystin millum Føroyar og Eysturríki á hesum linkinum: www.fifa2010blog.com/faroe-islands-vs-austria-live-streaming.html

# Rætti maðurin til

**- Eg visti, at talan fór at vera um eitt sera leitandi tíðarskeið fyri føroyskan landsliðsfótbólt. Men tað vildi verið púrasta burturvið, um Fótbóltssambandið fyri trimum árum síðani setti ein útlending, sum ikki hevði sama kunnleika til viðurskiftini, í starvi. Tað sigur Jógvan Martin Olsen fyri annað, tá hann lítur aftur á árini sum føroyskur landsliðsvenjari. Eitt starv, har hann nú bert hevur seks dagar og tveir dystir eftir í sessinum**



**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá Jógvan Martin Olsen mikudagin setti landsliðsspælarunum stevnu, var hetta samstundis byrjanin til endan á skeiði hansara sum landsliðsvenjari í hesum umfarinum. Eitt skeið, sum hevur fevnt um 11 ár, har Jógvan Martin Olsen so ella so hevur arbeitt við føroyska A-landsliðnum í fótbólti.

Hóskvøldið settu vit landsliðsvenjaranum stevnu á Hotel Føroyum, og hann viðgongur, at tað so ella so er eitt sindur kensluborið hesaferð.

- Eg havi hugsað nógv um, hvussu eg fór at tackla støðuna, nú eg havi boðað frá, at eg gevist sum landsliðsvenjari. Men onkursvegna havi eg valt at parkera akkurát tann spurningin til mikukvøldið. Og eg haldi, at tað hevur eydnast mær at parkera hesar tankarar í nakrar dagar.

Men tað kann væl ikki vera lætt, tá títt arbeiði nú í 11 ár hevur verið tengt at landsliðnum?

- Sjálvandi er tað ikki lætt. Men tá tú tekur eina slíka avgerð, so búnast hon eisini leingi. Eg havi tosað við míni nærmastu um tað, og tá tú hevur hugsað rímiliga leingi, so fært tú so ella so sett tingini upp á pláss í høvdinum. Tí tankin er avgjørt ikki nýggjur. Tú kanst siga, at eg havi hugsað tankan í fleiri ár. Eisini áðrenn eg gjørdi av taka av møguleikanum sum høvuðsvenjari hjá landsliðnum. Tá umhugsaði eg, um eg skuldi royna at taka nøkur stig onkran annan veg.

- So eg haldi, at tað hevur eydnast mær at parkera hesar tankarnar, men tað er sjálvandi løgið at vita, at leygardagi á Tórsvølli verður tað seinasta ferðin á hesum sinni, at eg standi við síðulinjuna, tá landsliðið spælir heimadyst.

- Men samstundis gleði eg meg. Eg havi kensluna av, at vit fara at enda væl, og eg kenni eisini á spælarunum, at teir er ógvuliga uppsettir, soleiðis at teir eisini kunnu enda hetta tíðarskeiðið á landsliðnum best møguligt.

### Kendi treytirnar

Ofta verður sagt, at velur ein venjari at gevast, so er best, um hetta verður fráboðað, tá kappingarárið er av. Hesa ferð ávirkar tað kanska ikki motivatiónina, nú talan er um somikið søguligan dyst, sum stendur fyri framman. Men hetta tykist nú ikki vera nakað, sum Jógvan Martin hevur givið serliga stóran ans.

- Eg visti alt fyri eitt, tá eg tók við, at mín uppgáva var at fremja eitt ættarliðsskifti. Tí hevur tað verið ein støðug telving, har eg havi tikið nøkur val. Nøkur teirra hava verið skeiv, og kanska skuldi eg tikið onnur fyri langari tíð síðani.

- Men eg havi kent tað soleiðis, at her hevur verið eitt somikið stórt arbeiði at gera, at tað vildi verið púrasta burturvið, um Fótbóltssambandið tá hevði sett onkran útlending, sum ikki hevði sama kunnleika til viðurskiftini, í starvi. Um hesin so hevði rent seg í somu óstøðugu úrsit, sum vit hava verið ígjøgnum. Skuldi hann so staðið fyri skotum eftir bara fýra-fimm dystir, har fólk kravdu ein nýggjan landsliðsvenjara?

- Tað kundi skjótt elvt til kaos, og í dag haldi eg, at vit eru komin væl ávegis. Eisini við teimum spælarum, sum vit hava á U21-landsliðnum. Roknar tú hesar við, so hava vit í dag ein hóp, sum so ella so kemur at manna landsliðið í nógv ár fram.

Tá tú sigur hetta, so sigur tú væl eisini, at tú visti, at talan var um eitt slag av urias-posti, sum tú átók tær fyri trimum árum síðani. Og at atfinningarnar til tíðir fóru at vera sera harðar?

- Eg visti í øllum førum, at talan bleiv um eitt rættiliga leitandi tíðarskeið. Henrik og eg tosaðu eisini um hetta, áðrenn hann gavst. Vit sóu spælarar sum Øssur Hansen, John Petersen og Pól Thorsteinsson gevast, og við hesum mistu vit stórar profilar og persónligheitir á liðnum. Tá menn sum Julian og Óli so eisini góvust, broyttist umhvørvið kring landsliðið fullkomuliga, tí her mistu vit eisini eina øgiliga rúgvu av royndum. Og brádliga skuldu spælarar, sum áður kanska vóru í útjaðaranum av liðnum, átaka sær berandi leiklutir.

- Tað gav nakrar heilt nýggjar støður, og eg kann bara enn einaferð siga, at tað gjørdi nøkur val neyðug, og meðan nøkur av hesum